# Okkum tørvar ikki at skora mál

**Hetta er eitt sindur sum ein fótbólts landsdystur, vit skulu upp at menga okkum við tær stóru tjóðirnar, og eg haldi, at vit hava enntá betur møguleika enn í fótbólti. Okkum tørvar t.d. ikki at skora mál, sigur Jón Tyril um kappingina The Global Battle Of The Bands**

GBOB

Hóast navnið GBOB er nærum tað fullkomna kappingarnavnið til eina kapping, sum G!Music skipar fyri, so vil Jón Tyril fyriskipari vera við, at hetta er tilvild.

GBOB er stytting fyri The Global Battle Of The Bands og somuleiðis vanliga heitið á kappingini. Jón sigur at hann satt at siga ikki visti av, at kappingin var rópt GBOB, tá hann setti sær fyri at skipa fyri einum føroyskum umfari. Men tað kundi ikki passa betur til G!, so tað ger tað ikki verri, heldur hann.

## Braquet vístu á møguleikan

Tað vóru Braquet, ið gjørdu G!Music varug við, at møguleiki var hjá føroyingum at sleppa upp í kappingina. Braquet høvdu roynt at melda seg til íslendsku útgávuna av kappingini, og blivu spurdir hví føroyingar ikki sjálvir skipaðu fyri.

Jón sigur, at hann var ikki í iva eina løtu, um hann skuldi taka av tilboðnum. “Hetta er jú ein frálíkur møguleiki fyri føroyskan tónleik. GBOB fevnir um 26 lond úr øllum heimspørtum. Vinningurin er umframt heiður og æru, 100.000 amerikanskir dollarar í reiðum peningi, og ein heimsumfevnandi konsertferð fyriskipað av GBOB International.”



*Lama Sea eru nokk Føroya besti livebólkur og ein av bólkunum, sum hava melda seg til GBOB*

## Leggur dent á talent

“Hetta ein kapping, sum leggur dent á talent, og hetta hava vit í ólukkumát í Føroyum” sigur hann. Hann ivast tí heldur ikki í at ein føroyskur bólkur kann gera seg galdandi í finaluni. Hann gleðir seg øgiliga nógv til finaluna. Har verður føroyskur tónleikur styrkismettur í beinleiðis kapping við bólkar úr øðrum londum, og hetta verður áhugavert. “Hetta er eitt sindur, sum ein fótbólts landsdystur, vit skulu upp at menga okkum við tær stóru tjóðirnar, og eg haldi, at vit hava enntá betur møguleika enn í fótbólti. Okkum tørvar ikki at skora mál” sigur Jón.

## 19 bólkar higartil

”Longu nú hava 19 bólkar meldað til, og eg veit um onkran annan, sum eisini fer at gera tað.” sigur Jón,

”Sambært royndunum hjá teimum, sum hava fingist við slíkt áður, so skal eg rokna við, at luttakaratalið kann økjast við upp til 50 % tað seinastu tíðina, áðrenn startskotið hósdagin í næstu viku” sigur hann. Hann greiðir frá, at tilmeldingin hevur verið rættuliga støðug higartil, og onkur bólkur hevur meldað seg til, men ikki goldið luttøkugjaldið enn, tí eru teir ikki skrásettir millum teir 19.

## Almennir dómarar

Í mun til Prix Føroyar verða nøvnini á dómarunum almannakunngjørd, Ætlanin er, at hava minst fimm dómarar, og minst tríggir av teimum skulu ætlandi vera útlendingar. Jón sigur at higartil hava teir bert fingið endaligt svar frá einum dómara. Tað er danin Jeppe Nissen. Jeppe er fyriskipari og umboðsmaður hjá DKBmotor, ið er størsta konsertfyrireikarafelag í Danmark, og sum hevur skipað fyri konsertum við nøvnum sum U2, Metallica, Roling Stones og Depeche Mode. DKBmotor er partur av Clear Channel Entertainment, sum er heimsins nógv størsta promotionfelag. Harumframt er Jeppe umboðsmaður hjá donsku bólkunum Nephew, L.O.C., Blue Foundation og The Raveonettes, og umboðar í Danmark útlendskar bólkar sum t.d. Soulfly og Kaiser Chiefs.

## Sýnisgluggi

Jón sigur, at tey eisini hava samband við dómarar úr Noregi, Svøríki, Týsklandi, Íslandi og onkrum øðrum úr Danmark. Felags fyri allar hesar er, at teir hava áhugaverd størv innan fyri tónleikaídnaðin. Hetta ger, at umførini í Føroyum samstundis verða sýnisglugga konsertir, og vónandi hoyra útlendsku dómararnir okkurt sum teimum dámar, og sum teir hava hug at hjálpa við at fáa út í heim.

## Størri gjøgnumskygni

Jón sigur, at valið at lýsa nøvnini á dómarunum alment, er fyri at skapa størri gjøgnumskygni, og hann er sannførdur um, at hetta ikki skaðar nakran. ”Nógv kjak var í sambandi við Prix Føroyar, um dulnevndar dómarar, so nú royna vit hetta” greiður hann frá. Dómararnir verða somuleiðis bidnir um, hvør í sínum lag, at skriva eina konstruktiva viðmerking til hvønn bólkin. Hesar viðmerkingar verða síðan givnar bólkunum.

## Ikki kappingarneytar

Hóast onkrir miðlar hava ført fram, at GBOB er ein beinleiðis kappingarneyti, og ivaleyst avloysarin til Prix Føroyar, so sigur Jón at hetta er alsi ikki so. GBOB er heldur ein supplering av Prixnum. Hann sigur seg hava fingið nógvan íblástur frá Prixnum, og vónandi fer Prixið eisini at fáa íblástur frá GBOB. Prix Føroyar hevur givið føroyskum tónleiki ótrúliga nógv, og tí hevur Jón ongan áhuga í at gera ein avloysara til Prixið.

## Kringvarpið verður við

Útvarp Føroya hevur fólk á staðnum. Hóskvøld og fríggjakvøld verða innsløg gjørd, meðan øll finalan verður send í útvarpinum leygarkvøldið. Jón Tyril sigur, at hann ikki er greiður yvir, um Sjónvarpið tekur upp ella ikki. Men hann ætlar sær at práta við tey.

## Hesir 19 hava teknað seg higartil

Deja Vu
Direct Level
Eager 2 Please
Efes
Frostbit
Holgar & Villmenn
Lama Sea
Lív Hansen
Marius
Non|Sense
Orion
Purpur
Sic
Synarchy
The Mount East
The Dreams
The Story Ends
Týr
Unattached.





**Guliklettur - Bordanes**
**Star River - Sjóborgin**
**Stathav - Siri**
**Suðurland - Jøkulfelli**

hava øll sína serligu søgu, og hana kanst tú lesa í nýggju bókini "Við úthavsins strendur", sum kemur út seinni í mánaðinum.

Bókin kostar 248 kr., og tygum fáa hana í postinum við at flyta 248 krónur á konto 9865 1028949 í Norðoya Sparikassa.

Tað ber eisini til at bíleggja bókina við telduposti.

**FORLAGIÐ GRÁFELLI**
grafelli@email.fo


# Basalt í Kagganum

Hetta vikuskiftið spæla Basalt til dans í Kagganum. Teir bjóða sítt vanliga bland av kontrirokki og øðrum dansivinarligum tónleiki.

Basalt eru Poul Müller (sang, mandolin og gittar), Kári Olsen (sang og gittar), Kenneth (ljómborð og sang), Mikkjal Øster (bass) og Annfinnur Jacobsen (trummir og sang). Verandi manning hevur spælt saman síðan 1998, men bólkurin hevur røtur heilt afturi í sjeyti árunum í bólkinum TARTA, ið Poul, Kenneth og Mikkjal spældu við í. Teir spæla kl. 0.30-3.30 í nýumvælda Kagganum fríggjakvøldið og leygarkvøldið.